Í Sørvági búgva, her hendir ein rúgva
við bólti vit spæla sum ørt
á sandinum renna, vit spæla og flenna
í kóri vit syngja viðhvørt




Og hundurin Fram, hann fyrgja mær man
á hesti eg ríði ein túr
eg tráðuna sleingi og standi eg leingi
so dragi eg skrubbu uppúr



Fuglarnir syngja, seyðurin jarmar
alt er so vakurt og flott
einki man tyngja, einki sum larmar
lívið at liva er gott



Ein dagin eg valdi, at sova í tjaldi
í hagan við ryggsekki rann
har áin man tvassa, so kundi eg vassa
mín sann, og eitt kombikk eg fann



Á ryggi eg liggi, at Tindhólmi hyggi
og njóti at hava frí
har Ytsti, Arni, Lítli, og Breiði og Boygni
seg toyggja ímóti ský

